ítróttur

Nr. 166 • hósdagur • 2. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Tey halda ondini í Vági

Guðrið Mortensen verður ikki at síggja á VB-liðnum komandi kappingarár. Hinvegin er tað ivasamt, hvussu verður við teimum trimum litavisku leikarunum hjá VB

Savnsmynd

Gurið Mortensen fer ikki at spæla við besta kvinnuliðnum hjá VB komandi kappingar, og ivasamt er við teimum trimum litavisku leikarunum

HONDBÓLTUR
Stefan í Skorini

VB hevur verið við til at mynda oddin í kvinnuhondbólti seinastu árini. Síðsta kappingarár fekk VB silvur í lands- og steypakappingini, og í 2003 struku VB-kvinnurnar avstað við øllum og vunnu greipuna.

Men tað er rættiliga ivasamt, hvussu sterkt VB-liðið verður í ár. Longu nú er greitt, at Gurið Mortensen sen ikki verður at síggja í VB-búnanum. Hon er farin til Danmarkar, har hon lesur til fysioterapeut í Næstved. Hetta er ein stórur missur, tí at Guðrið Mortensen hevur verið ein av stuðulsspælarunum hjá VB farnu árini, og í fjør gjørdist hon nummar tvey í atkvøðugreiðsluni um at gerast ársins leikari.

Útlendingar í óvissu

Enn er óvist, hvussu verður við teimum trimum litavisku leikarunum, sum vóru í Vági seinasta kappingarár.

– Tær hava latið sínar umsóknir og øll neyðug pappír inn á donsku ambassaduna í Litava, og nú bíða vit eftir svari frá myndugleikunum, sigur Bogi Mortensen, formaður í hondbóltsdeildini hjá VB.

Nú bíða tey í Vági spent eftir, um Innlendismálaráðið fer at viðmæla arbeiðsloyvum til hesar tríggjar leikararnar, og hvørja niðurstøðu danska útlendingastýrið fer at koma fram til.

Eingin ivi er um, at útlendsku leikararnir hava átt sera stóran lut í teimum góðu úrslitunum hjá VB undanfarnu árini, og tað er ein dyggur smeitur fyri kvinnuhondbóltin í Vági, um tær ikki fáa arbeiðsloyvi á hesum sinni.

Hava skund

Hondbóltskappingin fer av bakkastokki tann 10. oktober, og tí er VB farið at ótolnast eftir endaligum svari frá myndugleikunum.

– Tær kvinnurnar, sum eru í Vági, eru so smátt farnar at venja til komandi kappingarár, og teir litavisku leikararnir venja í heimlandinum. Men vit skulu helst hava liðið savnað til venjing nakað skjótt, um liðið skal bara vera samanspælt til kappingarbyrjan, sigur Bogi Mortensen.

– Vit vóna sjálvandi, at myndugleikarnir geva teimum arbeiðsloyvi, so at vit framhaldandi kunnu hava hondbólt á høgum støði her í Vági, leggur Bogi Mortensen afturat.

Útlendingar hækka støðið

VB fær mannað eitt kvinnulið til bestu deildina uttan styrk úr útlandinum, men tað verður ikki á sama støði sum í fjør.

– Tær útlendsku kvinnurnar hækka støðið í hondbóltinum, og tær draga hinar við sær, soleiðis at teir føroysku leikararnir mennast munandi, sigur Bogi Mortensen, og sipar til tey góðu úrslitini kvinnulandsliðið fekk í Challenge Cup í Italia.

Tær tríggjar litavisku kvinnurnar, sum eita Aukse Vysniaskaite, Daiva Tuomaite og Asta hava arbeitt í fiskivinnuni teir seks mánaðirnar, tær hava steðgað í Føroyum seinastu tvey árini.

Bogi Mortensen ber ikki ótta fyri, at tær taka arbeiði frá øðrum vágbingum, sum forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag hevur ført fram, nú málið um útlendska arbeiðsmegi hevur verið frammi í fjølmiðlunum.

– Talan er um tríggjar kvinnur, sum arbeiða her í Vági í seks mánaðir, og tað elvir ikki til tað stóra arbeiðsloysi, sigur Bogi Mortensen, og hann vísir eisini á, hvussu stóran týdning kvinnuliðið hjá VB hevur fyri felagslívið í Vági. Annaðhvørt vikuskiftið er ítróttarhøllin stúgvandi full av fólki, sum fylgja við kvinnuliðnum við stórum áhuga.

Silberbauer fingið bót

Tað var Sosialurin, sum í blaðnum tann 13. juli í ár avdúkaði málið um rúsdrekkakoyringina hjá Micheal Silberbauer í Havn eftir dystin ímóti HB, og nú hevur hann eisini fingið eina bót á 4.000 krónur

Mynd: Álvur Haraldsen

Danska heimasíðan onside.dk veit at siga, at Micheal Silberbauer nú hevur fingið bót fyri rúsdrekkakoyring í Føroyum

RÚSDREKKAKOYRING
Stefan í Skorini

Tað var undir venjingarleguni hjá FC København í Føroyum, at Micheal Silberbauer varð steðgaður av løgregluni náttina eftir dystin ímóti HB. Sosialurin skrivaði fyrst um málið í blaðnum tann 13. juli.

Fyrsta royndin vísti, at hann hevði ov nógv alkohol í blóðinum, og tí varð blóðroynd tikin av manninum. Heimasíðan Onside sigur seg vita, at promillan hjá Silberbauer var 0,52, og hetta er eitt vet ov nógv sambært ferðslulógini.

Í Føroyum gevur promillukoyring millum 0,5 og 0,8 eina bót á 4.000 krónur og eina treytaða frádøming av koyrikortinum. Men tann treytaða frádømingin er bert galdandi í Føroyum, og tí skal Silberbauer ikki upp til nýggja koyriroynd í Danmark. Bótin stendur tó við.

Í Danmark er lógin øðrvísi, og har gevur promillukoyring ímillum 0,5 og 0,8 ikki treytaða frádøming í fyrsta umfari, men ikki fyrr enn viðkomandi er tikin fjórðu ferð við hesi promillu verður talan um treytaða frádøming.

Silberbauer iðrar seg

– Tað var sera býtt av mær, men eg helt meg var føran fyri at koyra bil. Nú havi eg fingið eina bót, og so er hatta málið úti av verðini fyri mítt viðkomandi. Eg haldi, at hetta málið hevur verið sligið ov stórt upp, samanborið við tað, sum tað veruliga var, sigur Silberbauer við onside.dk.

Silberbauer sjálvur heldur ikki, at hetta málið hevur so nógv uppá seg. – Hatta var ikki øll verðin, sigur hann um alkoholnýtsluna, sum var tann dagin, hann hevði føðingardag.

Linda Hesselberg, ákæri hjá fútanum, vil ikki gera nakrar viðmerkingar til málið og vísir á, at hetta er eitt persónsmál, har tey ikki lata fjølmiðlum nakrar upplýsingar. Ítróttarstjórin í FCK, Niels Christian Holmstrøm, vil heldur ikki gera nakrar viðmerkingar til málið.

Tveir føroyskir sigrar

Teir skjóta framvegis mál í Íslandi, har Hans Fróði Hansen, sum ikki hevur verið úttikin fleiri ferðir, týskvøldið aftur var á Fram liðnum

ÍSLAND
Jóannes Hansen

Hans Fróði Hansen tykist at hava endurvunnið plássið í verjuni hjá Fram í Íslandi

Í gjár varð sagt, at teir mest sum eru givnir at skjóta mál í Íslandi. Tað varð sipað til, at tríggir dystir skuldu havt verið spældir í Íslandi mánakvøldið, og at bara eitt mál varð skorað í øllum trimum dystunum.

Tað var satt, at KA av Akureyri mánakvøldið vann 1-0 í Reykjavík ímóti Fylkir. Men tað var við síðuna av, tá ið tað varð sagt, at talan var um málleysar uppgerðir millum Grindavík og oddaliðið FH og ÍA og Keflavík. Hesir báðir dystirnir vórðu ikki spældir fyrrenn týskvøldið, tá ið triði dysturin var tann millum Fram og KR. At dystirnir vóru útsettir komst av, at veðrið í Íslandi var stak vánaligt mánakvøldið.

Julian Johnsson og liðfelagarnir í ÍA vunnu 2-1 á heimavølli ímóti Keflavík, og FH legði seg orduliga aftur í toppin. Teir vunnu við ikki minni enn 4-0 í Grindavík, har heimaliðið longu miðskeiðis í fyrra umfarinum misti ein mann. Í FH tykjast teir hava skotið papageykin, tá ið teir keyptu útlendskan álopsspælara. Danin Allan Borgvardt skoraði trý tey fyrstu málini fyri FH, og brotssparkið, sum bar fjórða málið við sær, var gjørt ímóti honum. Ein annar danskur spælari, Tommy Nielsen, umsetti úr ellivu metrum. Við sigrinum er FH undan tveimum teimum síðstu umførunum trý stig frammanfyri ÍBV og oddaliðið. Nógv bendir tiskil á, at tað skal fara at eydnast FH at vinna meistaraskapin fyri fyrstu ferð.

ÍA er á fjórða plássinum. Undan steðginum týskvøldið sá einki út. Keflavík legði seg framum við brotssparki. Eftir steðgin svaraði ÍA tvær ferðir aftur. Tá ið ein tími var farin, javnaðu teir, og tá ið tað restaðu seks minuttir skoraðu teir sigursmálið.

Fram uppum

Mest sum alt kappingarárið hevur Fram stríðst fyri at sleppa undan niðurflyting. Eftir nógv tey flestu umførini hevur felagið hjá Fróða Benjaminsen og Hans Fróða Hansen verið niðanfyri strikuna. Eftir sekstanda umfarið er Fram omanfyri strikuna. Teir hava seytjan stig, og niðanfyri teir eru Víkingur og KA, sum bæði hava fimtan stig.

Týskvøldið vann Fram grannauppgerðina ímóti meistarunum tvey tey seinastu árini, KR, 1-0. Málið, sum teir fingu í 2. hálvleiki, skoraði Viðar Guðjónsson. Fróði Benjaminsen var leikbannaður. Hans Fróði Hansen hevur síðani venjaraskiftið fyrr í summar havt ilt við at vinna sær pláss á liðnum. Tað man hava verið við til at kosta honum landsliðsplássið. Týskvøldið var Hans Fróði allar 90 minuttirnar í Fram miðverjuni. Sambært íslendskum fjølmiðlum stóð hann seg væl.

3rd Klaksvík International:

Ólavur lagt seg á odda

Rættiligt rok sást á øllum borðum í altjóða talvkappingini í Klaksvík í gjár. Teir tríggir føroysku luttakararnir møttu allir útlendskari mótstøðu og skjótt var greitt, at menn ætlaðu sær at stríðast fyri sigrinum

TALV
Tíðindaskriv

Ólavur Simonsen hevur lagt seg á odda í talvkappingini 3rd Klaksvík International

Savnsmynd

Føroyameistarin Martin Poulsen lá best fyri undan fimta umfarinum og var avbjóðingin í dag íslendski altjóða meistarin Sævar Bjarnason. Martin kom aftur væl frá byrjanini og fekk fyrimun við hvíta fólkinum. Íslendarin stóð kroystur leingi, men varð seg væl og fekk eisini sett onkra fellu fyri føroyameistaranum.

Martin bleiv lumpaður í miðspælinum og misti ein rók fyri ein bisp. Sævar slapp sær nú í endatalv við eini finnu meir og eydnaðist tað honum at vinna talvið. Martin skal í seinnu hálvu skora 4 stig út av fimm talvum til tess at røkka IM norminum.

Ólavur sló til

Ólavur møtti í dag oddafiskinum Emil Hermansson við hvítum. Talvið gjørdist sera spennandi og væl leikt, við Ólavi í álopi og svianum í verjuni. Ólavur kom í rúkandi tíðarneyð, men megnaði hóast tað at halda støðinum uppi, og brádliga var hann sloppin út í eitt gott endatalv. Men Hermansson leikti væl og hevði møguleikar at avgera talvið í tíðneyðuni. Tá hann ikki fann rætta leikin, sló Ólavur til og koppaði favorittinum í einum sera undirhaldandi talvi. Ólavur skal hava 3,5 stig í seinnu hálvu til IM normin.

Heini Olsen kom sær í rættiligt ódnarveður móti danska altjóða meistaranum Jens Ove Fries Nielsen. Við smáum óneyvum leikum í byrjanini, kom Heini um í verri við hvítum. Danin vaks við uppgávuni og fór í eitt eirindaleyst álop móti hvítu støðuni. Heini svaraði væl aftur, men tíðin var knøpp og at enda fall støðan saman og Heini gavst. Flott telvað av dananum og Heini skal nú hava heili 4,5 stig í seinnu hálvu fyri at skora sín næsta IM norm. Ein sera torføv uppgáva.

Støðan er nú tann at Ólavur Simonsen og Jens Ove Fries Nielsen hava 3 stig. Emil Hermasson og Martin Poulsen hava 2,5 stig. Heini Olsen og Sævar Bjarnason hava 2 stig.

U-19 brynjar seg til EM

Landsliðsvenjararnir hava tikið átjan mans út til komandi EM-undankapping, sum verður í Føroyum í oktober mánað

FÓTBÓLTUR
Stefan í Skorini

Føroyska U-19 landsliðið skal á heimavølli taka ímóti trimum londum, ið skulu dystast um at koma víðari til EM-endaspælið komandi summar. Mótstøðuliðini vera Grikkaland, Ungarn og Wales.

– Grikkaland plagar at hava rættiliga sterk ungdómslandslið, og tí eru teir helst favorittar í hesum bólkinum, sigur Pætur Clementsen, hjálparvenjari á U-19 landsliðnum. Hinvegin vita vit ikki so nógv um Ungarn frammanundan kappingini. Wales plagar minna nógv um England í spælistíli.

Tríggjar venjingarlegur

– Vit fara savna hópin á venjingarlegum trý tey komandi vikuskiftini, og tá fara vit at hava at kalla allan hópin savnaðan. Tað hevur verið sera torført at savna allar leikararnar samstundis, av tí at teir spæla í rættiliga ymiskum deildum í Føroyum, sigur hjálparvenjarin.

Higartil hava venjararnir ongantíð havt allan hópin savnaðan samstundis av hesi somu orsøk, men nú er tann endaligi hópurin úttikin.

Tríggir av leikarunum spæla í Frem í Danmark, og tveir teirra koma heim til venjingarlegurnar.

Hesir leikarar manna U-19 landsliðið: Svenn Jacobsen, Poul T. Dam, Páll Mohr Joensen, John Eivind Restorff Mouritsen og Emil Nolsøe Leivsson úr HB. Tórður Thomsen úr NSÍ. Fritleif í Lambanum úr ÍF. Jóhan Petur Poulsen og Ovi Magnussen úr B68. Arnbjørn Theodor Hansen úr EB/Streymi. Poul N. Poulsen úr VB. Julian Samuelsen úr KÍ. Jónas Tór Næs, Gunnar Nielsen og Bogi Hermansen úr Frem.